Vikuskiftis Sosialurin



## Vilja banna tunfiskaveiði

Umhvørvisverndarfelagsskapirnir WWF og Greenpeace vilja hava myndugleikarnar at banna skipum at veiða tann sokallaða bláuggatunfiskin, tí stovnurin er ovfiskaður, og hesum taka vísindafólk undir við. Tað skrivar Morgunblaðið. Altjóða vísindanevndin viðvíkjandi tunfiski í Atlantshavinum sigur, at gýtingarstovnurin er bara 15 prosent av tí, sum hann var, áðrenn fiskiskapurin byrjaði. Tað eru serliga japanar, sum vilja hava bláuggatunfisk, sum teir brúka til ymiskan sushi-mat, og japonsk skip hava roynt eftir tunfiski vesturi í Atlantshavinum. Íslendsk skip hava eisini gjørt onkrar royndir eftir tunfiski.



## Søkt við ringum tannabiti

Íslendski fiski- og landbúnaðarmálaráðharrin, Jón Bjarnason, viðgekk á aðalfundi í íslendska reiðarafelagnum fyrr í vikuni, at tað var við ringum tannabiti, at hann hevði tikið undir við, at Ísland skuldi søkja um limaskap í ES. Hann segði millum annað, at í samráðingunum við ES verður fiskivinnan eitt av teimum allarfyrstu málunum, tí hon skal ikki bíða til endan, segði hann. Formaðurin í reiðarafelagnum, Adolf Guðmundsson, segði á aðalfundinum, at reiðarafelagið heldur fast um, at íslendingar skulu hava alt ræðið á sínum fiskiríkidømi, bæði egnum og ferðandi stovnum.

# 20 almenn størv flytast úr Eysturoynni til Klaksvíkar

**Landsstýrið kannar møguleikan at keypa býráðshúsið í Klaksvík til almenna umsiting og so skal TAKS í Saltangará flytast til Klaksvíkar. Jóannes Eidesgaard sigur, at tað eru nógvar sakligar orsøkir fyri eini slíkari broyting**

ALMENN STØRV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Landsstýrið kannar nú møguleikan fyri at keypa býráðshúsið í Klaksvík til almenna umsiting. Tað, sum liggur í kortunum, er at flyta tey 20 størvini hjá TAKS í Saltangará til Klaksvíkar og at savna alt norðurøkið hjá TAKS undir somu lon í Klaksvík*

Nú er ætlanin at samansjóða Taks í Klaksvík og í Saltangará undir sama høli. Og tað er nógv, sum talar fyri, at tað tað høli verður í Klaksvík.

Sostatt verða tey 20 almennu størvini á Taks í Saltangár, flutt til Klaksvíkar.

Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, váttar, at arbeitt verður við at samansjóða Taks í Eysturoy og í Klaksvík.

Hann heldur, at tað eru nógvar sakligar orsøkir til at gera tað. Og hann heldur eisini, at tað er nógv, sum talar fyri, at tað er rættast at gera tað í Klaksvík.

Hann er so mikið vísur í tí, at hann hevur longu tosað við borgarstjóran í Klaksvík, Gunvu við Keldu um at landsstýrið skal keypa Býráðshúsið í Klaksvík til endamálið.

- Borgarstjórin í Klaksvík var rættiliga positiv, sigur hann.

### Ørkymlandi

Jóannes Eidesgaard staðfestir, at tað er ein trupulleiki, at Norðurøkið hjá Taks er savnað í tveimum ymsum umsitingum, tí tað er órationelt.

- Tí hevur tað leingi ligið í kortunum at savna norðurøkið hjá Taks undir somu lon, men tað hevur ongantíð eydnast enn.

Hann hevur í vikuni verið á vitjan í Klaksvík og í Runavík og hann var hugtikin av, hvussu væl stovnurin virkaði.

- Men tað er ørkymlandi, at norðurøkið hjá Taks er býtt sundur í tvey, har 20 starvsfólk sita í Runavík og 20 fólk sita í Klaksvík.

Tí váttar hann, at hann arbeiðir við at leggja báðar umsitingarnar saman.

### Nógv talar fyri Klaksvík

Hann hevur ikki endaliga gjørt av, hvar tann samanlagdi stovnurin skal vera.

Men hann heldur, at tað eru góðar grundgevingar fyri at leggja hann í Klaksvík.

Í Runavík er Taks í leigaðum hølum. Í Klaksvík eigur Taks høli, men tey eru ov lítil.

Tí verður tað eisini ein spurningur um, hvussu hølisspurningurin kann loysast.

- Eg haldi, at býráðshúsini í Klaksvík eru eini frálík høli, sum liggja sera væl fyri.

Jóannes Eidesgaard sigur, at nú skulu embætisfólk kanna møguleikarnar og koma við eini niðurstøðu um hvat kann gerast og um býráðshúsið í Klaksvík er egnað til endamálið.

Hann vísir eisini á, at tá ið undirsjóvartunnilin er komin ímillum Skálafjørðin og Suðurstreym, liggur Saltangará einir sjey minuttir í bili úr Havnini og tí er ikki nógv meining í at rokna TAKS har upp í norðurøkið.

Harafturat heldur hann, at 20 almenn størv afturat í Klaksvík kundu lyft økið, tí Klaksvík hevur staðiliga tørv á einum beini afturat at standa á, so at ikki alt stendur og fellur við fiskivinnuni.

### 20 almenn størv

Men hetta merkir so, at aftur, at 20 almenn størv skulu flytast úr Eysturoynni til Klaksvíkar.

Tað er lítið væntandi, at politikarar úr Klaksvík fara at mótmæla hesum.

Men Bill Justinussen úr Miðflokkinum kallar hetta politiskan ágang ímóti Eysturoy og tí fer hann at seta Jóannesi Eidesgaard ein fyrispurning í Løgtinginum um hetta.

- Almenn arbeiðspláss hava ovurstóran týdning fyri trivnaðin, tí tey skapa fjølbroytni og øðrvísi avbjóðingar í einum lokalsamfelag, har fiskivinna, handil og ídnaður annars eru høvuðsavbjóðingarnar hjá komandi ættarliðnum.

Bill Justinussen svil eisini hava at vita um hetta er liður í einum partapolitiskum býtishandli har Heilsutrygdin kortini verður løgd í Sandoynni við sínum átta almennum størvum, men at Klaksvík so afturfyri fær tey 20 almennu størvini hjá Taks í Saltangará.

Men hetta avsannar Jóannes Eidesgaard.

- Hesi bæði málini hava onki við hvørt annað at gera, staðfestir hann.

## Etikkur og virði í kappingarítrótti

**Mánadagin 2. november kl 19.00 verður alment evniskvøld í Miðlahúsinum um etikk og viðrir í kappingarítróttinum.**

Er tað munur á, hvat ein venjari kan loyva sær í amatørítrótti og yrkisítrótti? Er tað munur á, hvussu man kann loyva sær at uppføra seg í t.d, billiard og fótbólti? Er tað í lagi, at senda ein skaddan fóbóltspælara inn á vøllin? Er tað óetiskt at fella ein fótbóltsleikara, sum er fríur framman fyri málinum? Er tað í lagi, at foreldrini skelda dómaran? Er tað í lagi, at foreldrini undir einum dysti skelda mótspælararnar? Er tað í lagi, at ein 18 ára gamal drongur gongur saman við 17 ára gamlari gentu, sum er á liðnum, hann venur? Er tað í lagi at nýta euforiserandi evni, bara tað ikki verður uppdagað? Hví blíva súkklararnir, sum eru við í Tour de France, ikki oftari avdúkaðir í dopingmisnýtslu? Er tað skaðiligt ella er tað bara býtt?

Hví er man í Danmark byrjaður at taka dopingroyndir í venjingarmiðstøðum?

Alt hetta og nógv meira fæst svar uppá evniskvøldið við professara, dr.jur.

Jens Evald, sum er formaður fyri Anti Doping Danmark og hevur verið við til at skriva etisku leiðreglurnar fyri danskan kappingarítrótt.

Jens Evald (f. 1961) er professari, dr.jur. við Juridisk Institut, Århus Universitet, har hann undirvísir í rættargagnsøgu, rættarfilosofi og ítróttaløgfrøði.

Hann hevur verið formaður fyri nevndina í Anti Doping Danmark síðani mars 2006. Í 2005-2006 sat Jens Evald í nevndini, sum Team Danmark og danska Ítróttasambandið valdu til at gera "Etisk kodeks for dansk konkurrenceidræt". Eisini er Jens Evald formaður í dómsnevndini í danska kano- og kajaksambandinum og hevur sitið í nevndini í Dansk Idrætsjuridisk Forening.

# Toskakørini í Hvalba eru tóm

**Í løtuni er ikki greitt, hvørja lagnu toskaalingin í Hvalba fer at fáa. Seinastu toskarnir eru nú tiknir, og tey tvey kørini, har fiskurin hevur verið aldur, standa nú tóm**

TOSKAALING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var stórur spenningur millum fólk, tá farið varð undir royndirnar at ala tosk í Føroyum. Serliga var tað toskurin av Føroyabanka, sum hevði áhuga. Hetta er ein serstakur stovnur og ein serstakur fiskur, sum veksur skjótari enn annar toskur, vit kenna.

Í februar mánaða í 2007 vórðu fyrstu toskamurtarnir settir út í tey bæði kørini, sum Faroe Cod Farm í Hvalba hevur havt standandi í Nesi.

Fyrr í ár varð alistøðin rakt av óhappi, tá pumpuskipanin sveik, og nakrir túsund toskar doyðu av illtroti.

### Alt tikið

Seinastu vikurnar hava hvalbingar tikið tosk, sum hevur svomið í kørunum í Nesi, og nú er liðugt at taka.

Richard Rognsøy, stjóri í Faroe Cod Farm, sigur seg í løtuni ikki hava neyva talið yvir, hvussu nógv er tikið, men váttar, at nú eru tey bæði kørini í Nesi tóm.

- Vit hava nú tikið allan fiskin og fara at gera status yvir, hvussu henda tíðin hevur vignast.

Stjórin sigur, at felagið hevur ikki verið heppið við prísstøðnum, nú fiskurin er tikin, men roynt hevur verið at fingið sum frægast burtur úr.

Hann vísir á, at prísurin fyri alda toskin hevur ligið umleið á sama støði, sum prísurin fyri villan tosk.

- Hinvegin hava vit fingið góðar afturmeldingar frá teimum, sum hava keypt fiskin.

Richard vísir á, at eitt nú í Fraklandi siga tey seg ongantíð hava sæð slíkan tosk áður, og eisini aðrastaðni hava teir skilt, at prísútlitini frameftir við framhaldandi aling í Hvalba eru góð.

- Henda tíðin hevur givið okkum nakrar avgerandi staðfestingar, sum arbeiðast kann víðari við. Vit hava fingið staðfest, at tað ber væl til at ala tosk í kørum á landi, fiskurin veksur væl, eins og keyparar eru sera fegnir um fiskin.

### Framtíðin

Richard Rognsøy sigur, at framtíðin hjá Faroe Cod Farm ikki er greið beint í løtuni.

- Nú fara vit at gera status, men eftir at døma verður eingin fiskur settur útaftur til várs.

Stjórin vísir á, at arbeitt hevur verið við ætlanini at útbyggja toskaalistøðina í Hvalba við seks stórum kørum.

- Hetta er ein størri útbygging, sum er neyðug, um verulig vinna skal spyrjast burtur úr alingini.

Tey bæði kørini, sum í dag standa uppi í Nesi, taka tilsamans 1200 rúmmetrar av sjógvi. Hinvegin taka tey seks kørini, sum eru við í útbyggingarætlanini, millum 11.000 og 12.000 rúmmetrar av sjógvi.

- Enn eru viðurskiftini ikki komin upp á pláss, hvørki við íleggjarum, ei heldur loyvum, og tí er trupult í løtun at siga, hvør lagnan við toskaalingini í Hvalba verður, sigur Richard Rognsøy, stjóri.